Rúsdrekkasølan skal lyftast upp á eitt hægri tænastustig

Sølu- og tænastuleiðari søkist

Í sambandi við at Rúsdrekkasøla Landsins setur fokus á at menna tænastuveitingar sínar, verður lýst eftir leiðara at standa á odda fyri hesum arbeiði. Viðkomandi, ið settur verður, verður leiðari fyri sølu- og tænastudeildini, hvørs uppgáva er at tryggja eina góða tænastuveiting til allar viðskiftabólkar hjá Rúsdrekkasølu Landsins í samsvari við verandi lógarásetingar og strategisku ætlanina hjá fyritøkuni.

Viðkomandi skal duga at standa á odda fyri broytingum, vera við til at menna fyritøkuna á tænastuøkinum og fer at hava um hendi nógv samskifti við kundar og aðrar viðskiftabólkar. Í samljóði við endamálsorðingina um viðvirkan til tálming verður dentur eisini lagdur á øki sum ráðgeving, vegleiðing, upplýsing og fyribyrgjandi átøk, herímillum heimasíðurøkt, skeið um vørur okkara og kanningar.

Sølu- og tænastuleiðarin vísir til stjóran og verður partur av leiðslubólkinum. Handilsleiðararnir og goymsluleiðarin vísa til sølu- og tænastuleiðaran. Arbeiðið fevnir um nógvar tvørgangandi arbeiðsuppgávur, loypandi ad hoc uppgávur, íverksetan og verkætlanarleiðslu. Arbeiðsuppgávan er breið og fjølbroytt, og tí er neyðugt við góðari stýring og fokusering, og at ein dugir væl at tillaga seg.

Uppgávu- og ábyrgdarøki á sølu- og tænastudeildini
- Sølubúðir og tænastuveitingar annars
- Samskifti og kunning, herímillum fyribyrgjandi átøk og branding
- Hagtalsviðgerð og hagtalskanningar
- Førleika- og tænastumenning

Faklig førleikakrøv
- Akademisk útbúgving, t.d. Cand.merc. ella annar javntstillaður førleiki saman við viðkomandi leiðsluroyndum.

Persónligur profilur
- Góð tænastuevni
- Menningarsøkin
- Góðar førleikar innan broytingarleiðslu
- Skipað og kreativt arbeiðslag
- Duga væl við fólki
- Góð leiðslu-, samskiftis- og samstarvsevni
- Dugnaligur sparringspartnari (coaching)
- Humor

Setanartreytir
Setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir
Umsóknir við avritum prógvum, CV og ummælum skulu í seinasta lagi 4. august 2008 sendast til Rúsdrekkasølu Landsins, att.: Elsa Maria Holm Olsen, Hoyvíksvegur 51, FO-100 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, vinarliga set teg í samband við Elsu Mariu Holm Olsen, stjóra, á tlf. 580 129 ella á emo@rusan.fo.

SENDISTOVAN

Rúsdrekkasøla Landsins
Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn
Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60

Fyribilsstørv

Strandfaraskip Landsins søkir hervið eftir tveimum fólkum til ymiskt fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði umborð á skipunum hjá SSL. Størvini eru fyribils tíðarmarkaði, og ynskiligt er, at viðkomandi kunnu byrja beinanvegin og verða í starvi til endan av oktobur 2008.

Starvið
Arbeiðsuppgávan er alt vanligt viðlíkahaldsarbeiði, sum til eina og hvørja tíð verður fyriskipað av skipsleiðsluni. Arbeitt verður eftir einari arbeiðsætlan mánadag til fríggjadag, og verður arbeiðstíðin umleið 50 tímar um vikuna.

Førleikakrøv
- Viðkomandi førleikar og royndir
- Nærlagni
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevnir

Setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir skulu sendast til:

Strandfaraskip landsins
Att: Conrad Gaard Joensen
Postsmoga 30
FO-810 Tvøroyri

Og skulu verða fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 18 august 2008 kl 12.

Eru spurningar til starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við Conrad Gaard Joensen, leiðara á Sjódeildini, á tlf nr 543041 ella á teldupostadressu cgj@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Løgmálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.

Føroyar mítt land

Føroyar mítt land á Rás2 sunnudagin 3. august fevnir um tær seks sendingarnar, sum vóru í vikunum fyri og eftir ólavsøku. Í tí fyrru vikuni hoyrdu vit fyrst um gamalt, føroyskt frásøgukynstur; tvær sendingar vóru um óskipaðan og skipaðan kappróður fyri 90-100 árum síðani; og vikan endaði við broti úr einari ferðafrásøgn hjá týskaranum Carl Küchler, har hann greiðir frá ólavsøkuni, sum hann upplivdi hana í 1911. Tann fyrra av teimum báðum sendingunum eftir ólavsøku var um vevkonuna Katrinu á Trøllanesi; og í tí seinnu hoyrdu vit um Jens Christian Evensen, prást, sum segðist duga meira enn at mata seg. Janus Mohr, Ólavur Hátún, Turið Sigurðardóttir og Maria Jacobsen løgdu sendingarnar til rættis hesar báðar vikurnar.

Rás2, sunnudagin klokkan 13.

Føroyar mítt land í næstu viku:
4/8 Arne Thorsteinsson
5/8 Jógvan við Keldu
6/8 Martin Restorff Jacobsen
7/8 Janus Mohr
8/8 Helena Samuelsen

Hvønn gerandisdag kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl.23, (týsdag tó 22.30)